# Eldur í koyrandi bili




**Ein bilur koyrdi nakrar kilometrar við eldi í motorinum í gjár. Bilurin koyrdi í Vágatunnilinum, og hann steðgaði ikki fyrr enn við Leynatunnilin, tí at førarin varnaðist ikki eldin. Kvinnan í bilinum hevði trupult við at loysa seg úr trygdarbeltinum, tí at hon var skelkað. Orsøkin til eldsbrunnan er enn óviss**

ELDSBRUNI

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í gjár um klokkan trý kom eldur í ein koyrandi bil í Vágatunnilinum. Í bilinum var ein ungur maður og mamma hansara. Tey høvdu verið og ferðast í Grikkalandi, og bilurin hevði staðið í fjúrtan dagar á flogvøllinum. Tey vóru bæði á veg heim, tá ið eldur kom í.

Bilførarin legði ikki merki til eldin beinanvegin, og hann koyrdi víðari. Mótkoyrandi bilar varnaðust eldin, og teir royndu at blinka til unga mannin, og gera hann varugan við vandan. Nærum komin úr tunnilinum Streymoyarmegin, varnaðist ungi maðurin eldin, og hann steðgaði á strekkinum millum Vágatunnilin og leynatunnilin.

## Mamman skelkað

Bilførarin var sera fattur, og hann fekk steðgað bilinum. Mamman var rættiliga skelkað, og hon hevði trupulleikar við at loysa trygdarbeltið, tí at hon var so sinnisrørd. Tey komu tó bæði úr bilinum, og tey fingu eisini tikið alt viðførið úr bilinum.

Tey høvdu eina spann í bilinum, og sonurin royndi at sløkkja eldin við spannini. Brunnaliðið var á staðnum stutt eftir, og teir fingu sløkt eldin við einum pulvursløkkjara.

Bilurin er ikki vorðin heilskaddur. Enn er óvíst, hvør orsøkin til eldsbrunnan er, men bilurin hevur fyrr havt trupulleikar við el-skipanini, og tí kann hugsast, at eitt skammlop hevur elvt til eldin.

Løgreglan í Miðvági greiðir Sosialinum frá tilburðinum, og teir hava nú eftir hendingina aftur vent spurningin um trygdarbeltið.

– Tað vísir seg, at tað er trupult hjá skelkaðum fólki at loysa seg úr trygdarbeltinum. Fólk rykkja ov nógv í beltið, um tey skulu skunda sær úr bilinum. Hetta sæst eisini aftur, tá ið fólk koyra á sjógv. Tá hava tey ofta trupult við at loysa seg, tí at tey rykkja ov nógv í, og beltið læsist.

– Tað er týdningarmikið, at tú letur slakk vera í beltinum, tá ið tú loysir tað. So er eingin trupulleiki, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.


Klaksvíkar Kommuna / Tilhaldið Sóljan



Starvsfólk

**Søkt verður eftir starvsfólki til Tilhaldið Sóljuna, 24 tímar um vikuna.**

**Arbeiðsuppgávur**
- Skapa trivna fyri tey vitjandi
- Taka væl ímóti teimum vitjandi
- Matgera til viðskiftafólk
- Geva ráð og vegleiðing til tey vitjandi
- Koma við uppskotum og fyrireika tiltøk, ið eru á skránni
- Virka fyri einum hugnaligum umhvørvi
- Avloysa leiðaran, tá hesin er burturstaddur

***Útbúgving/ royndir:***
- *Drúgvar arbeiðsroyndir*
- *Hóskandi útbúgving ella starvsroyndir*
- *Góð samstarvsevnir og áhuga í samfelagsligum viðurskiftum*

**Onnur krøv:**
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Skal vera røkin
- Skal vera framsøkin
- Skal hava lætt við at samskifta
- Skal kunna átaka sær fyrifallandi uppgávur

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum kommununa og avvarðandi yrkisfelag.

Meir fæst at vita við at venda sær til leiðaran av Tilhaldinum Sóljuni, Mamy Dahl Sørensen á tel 22 05 66.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Klaksvíkar kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík **í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 8. september 2006.**

**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**700 Klaksvík**

**Stutt um Tilhaldið Sóljuna**
Sóljan er eitt tilhaldsstað, har eldri fólk hittast til ymisk ítriv, undirhald, túrar, prát v.m.
Umleið 25 fólk vitja dagliga.

creo 458006

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo



SKEMMAN | søkir handilslærling



**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir**

**Vit bjóða:**
· Møguleika fyri altjóða útbúgving
· Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
· Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
· Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

pétur & pétur • 320870

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709

SKEMMAN